# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 9. des. 2025 |
| Mál nr.: | N/A |
| Málsviðgjørt: | HP, TM |
| Ummælistíð: | 10. des. 2025 til 6. januar 2026 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)**
(Persónar, sum hava fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av eftirlønarsamansparing áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai um eftirløn (Eftirlønarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 133 frá 19. desember 2014, § 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 19. desember 2014, løgtingslóg nr. 44 frá 6. mai 2015, løgtingslóg nr. 157 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018, § 1 í løgtingslóg nr. 78 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 35 frá 26. mars 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Aftan á § 11 verður í kapittul 4 sett:

"*Framskundað útgjald í sambandi við framskundaða pensjón og fyritíðarpensjón*

**§ 11 a.** Eftirlønarsamansparari, sum hevur fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón sbrt. lóg um almannapensjónir o.a., kann byrja eftirlønarútgjald, tá ið hann røkkur aldursmarkið fyri at fáa tillutaða framskundaða pensjón sbrt. lóg um almannapensjónir o.a. TAKS váttar, at útgjald av eftirlønarsamansparingini kann byrja, tá Almannaverkið hevur játtað umsókn.
*Stk. 2.* Ásetingarnar í § 9, stk. 2, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í § 9, stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. § 11 a."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. mars 2026.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið og samgongan ynskja og skjóta upp, at persónar, sum nærkast almenna fólkapensjónsaldrinum, og sum orsakað av varandi avlamni hava skerdan arbeiðs- og vinnuførleika og tí fáa tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av sínari privatu eftirlønarsamansparing áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin.

Hetta uppskotið til broytingarlóg snýr seg um at geva møguleika fyri, at persónar, sum hava fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av eftirlønarsamansparing framskundað í mun til almenna fólkapensjónsaldurin.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Lógargrundarlagið undir føroyskum eftirlønum er eftirlønarlógin og rentutryggingarlógin. Eftirlønarlógin kom í gildi 1. januar 2014. Eftirlønarlógin gevur ikki møguleika fyri, at persónar, sum nærkast almenna fólkapensjónsaldrinum og sum orsakað av varandi avlamni hava skerdan arbeiðsførleika og tí fáa tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av eftirlønarsamansparing áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin.

Tó er ein áseting í § 9, stk. 5, sum ásetir, at *fyri eftirlønarsamansparara, har tað læknafrøðiliga verður staðfest, at hann, grundað á sjúku, hevur niðursettan væntaðan miðallivialdur, ber til at byrja eftirlønarútgjald, áðrenn eftirlønarsamanspararin nær fólkapensjónsaldri sambært lóg um almannapensjónir*.

Ikki allir persónar við framskundaðari pensjón ella fyritíðarpensjón lúka treytirnar í 9, stk. 5 í eftirlønarlógini, tí tað er ikki víst, at staðfestast kann ein væntaður niðursettur livialdur.

Sbrt. eftirlønarlógini kunnu eftirlønarsamansparingar í útgangsstøðu setast í útgjald, tá ið eftirlønarsamanspararar røkka almenna fólkapensjónsaldurin. Hetta uppskotið til broytingarlóg, snýr seg um at gera broytingar í eftirlønarlógini, soleiðis at fólk, sum móttaka framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón kunnu seta sína eftirlønarsamansparing í útgjald áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin.

Lógaruppskotið viðvíkur persónum, sum fáa tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón. Lógargrundarlagið undir framskundaðari pensjón og fyritíðarpensjón er løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Framskundað pensjón og fyritíðarpensjón verður veitt persónum, hvørs arbeiðsføri varandi er skert við í minsta lagi eini helvt. Pensjónsupphæddin til persón við framskundaðari pensjón er í minsta lagi miðal fyritíðarpensjón. Hevur persónurin onki arbeiðsføri eftir, er veitingin svarandi til hægstu fyritíðarpensjón.

**Pensjónsupphædd um mánaðin í 2026 aftaná skatt og gjøld (umleið)**

| | Støk | Gift |
|---|---|---|
| **Hægsta fyritíðarpensjón** | 16.160 kr. | 13.620 kr. |
| **Miðal fyritíðarpensjón** | 13.340 kr. | 11.030 kr. |

*Viðm.: Fyritíðarpensjón og framskundað pensjón er lutvíst skattafrí, og harumframt hava hesi rætt til ein frádrátt í skattinum.*

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Landsstýrið og samgongan ynskja, at persónar, sum nærkast almenna fólkapensjónsaldrinum og sum orsakað av varandi avlamni hava skerdan arbeiðsførleika og tí fáa tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av sínari privatu eftirlønarsamansparing áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin.

Eitt av endamálunum við eftirlønarlógini er at betra um fíggjarligu umstøðurnar, tá ið arbeiðslívið er farið afturum. Ein persónur, sum fær tillutað framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón hevur vanliga eitt langt arbeiðslív aftanfyri seg, og í framtíðini fer hann eisini at hava eina pensjónssamansparing. Framskundaða pensjónin og fyritíðarpensjónin verður tillutað, tí viðkomandi av heilsuávum ikki kann halda fram á arbeiðsmarknaðinum, og tí kann atgongdin til egna eftirlønarsamansparing betra livikorini og liviumstøðurnar hesi árini.

Tað fer ikki hjá øllum at løna seg at fáa pensjónssamansparingina útgoldna, og tí verður tað upp til tann einstaka at gera av, um tikið verður av møguleikanum. Ein persónur við framskundaðari pensjón ella fyritíðarpensjón kann í 2026 hava árliga inntøku (inntøkugrundarlag) á 106.000 kr., áðrenn pensjónin lækkar. Mótroknað verður við 30% av inntøku hægri enn 106.000 kr. Nøkur hava óarbeiðsføristrygging, og nøkur hava nakað av arbeiðsinntøku aftrat pensjónini og hava tí eitt ávíst inntøkugrundarlag. Hjá hesum kann tað vera ein fíggjarligur fyrimunur at bíða við at fáa útgoldið sína privatu eftirlønarsamansparing.

Hetta uppskotið til broytingarlóg, snýr seg um at geva møguleika fyri, at persónar, sum hava fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av eftirlønarsamansparing framskundað. Skotið verður upp, at persónar, sum hava fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja eftirlønarútgjald 3 ár áðrenn galdandi fólkapensjónsaldur.

Sambært galdandi lóggávu kann eftirlønarsamansparing útgjaldast áðrenn fólkapensjónsaldur, um tað læknafrøðiliga verður staðfest ein niðursettur væntaður miðallivialdur. Læknafrøðiliga staðfestingin er ikki altíð einføld at handfara. Við hesum uppskotinum verður møguleikin fyri útgjaldi av eftirlønarsamansparing grundaður á objektivar treytir.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið gevur møguleika fyri, at persónar, sum hava fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av eftirlønarsamansparing framskundað. Skotið verður upp, at persónar, sum hava fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja eftirlønarútgjald 3 ár áðrenn galdandi fólkapensjónsaldur.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

[...]

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at broytingarnar í lógaruppskotinum fara at hava við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan, verður lógaruppskotið samtykt og broytingin sett í verk.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at broytingin fer at hava við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið fer at hava við sær, at persónar, sum fáa tillutaða framskundaða pensjón og fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av sínari privatu eftirlønarsamansparing áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin. Talan er um ein bólk av borgarum, sum nærkast almenna fólkapensjónsaldrinum, og sum orsakað av varandi avlamni hava skerdan arbeiðsførleika og tí fáa tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón.

Fyri hendan bólkin verður galdandi, um hesi velja at seta sína privatu eftirlønarsamansparing í útgjald áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin, at lívrentan tá skal gjaldast út yvir eitt longri tíðarskeið. Hetta fer tí at merkja, at mánaðarliga útgjaldið verður lægri, tí skal røkka til fleiri ár.

Viðmerkjast skal, at hesin bólkurin av eftirlønarsamansparararum helst er ein av teimum bólkunum, sum í miðal hevur minstu samlaðu samansparingina, tá ið tey røkka almenna fólkapensjónsaldurin. Helst eru tað fleiri í hesum bólkinum, sum eru og frameftir verða fevnd av verandi áseting í § 10, stk. 2 í eftirlønarlógini. § 10, stk. 2 í eftirlønarlógini sigur, at *er samlaða eftirlønarsamansparingin hjá øllum føroyskum eftirlønarveitarum tilsamans minni enn 400.000 krónur við eftirlønaraldur sbrt. § 9, stk. 2, kunnu í staðin upp til 60.000 krónur rindast út sum kapitalútgjald, og restin verða útgoldið við upp til 2.500 krónum um mánaðin.*

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru ikki, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

### 2.9. Markaforðingar

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki

**2.11. Skattir og avgjøld**
Í lógaruppskotinum eru ikki ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin ella til stovn undir landsstýrinum. Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1, nr. 1**

*Til uppskotið til § 11 a, stk. 1*

Við uppskotinum til nýggja § 11 a, stk. 1, verður ásett, at persónar, sum fáa tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a., kunnu byrja eftirlønarútgjald tá ið tey røkka aldursmarkið fyri at fáa tillutaða framskundaða pensjón sbrt. lóg um almannapensjónir o.a.

Ásett verður eisini, at TAKS váttar, at útgjald av eftirlønarsamansparingini kann byrja, tá Almannaverkið hevur játtað umsókn.

*Til uppskotið til § 11 a, stk. 2*

Við uppskotinum til nýggja § 11 a, stk. 4, verður gjørt greitt, at ásetingarnar í § 9, stk. 2, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í § 9, stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. § 11 a. Hetta merkir, at útgjøld, sum fara fram eftir ásetingunum í uppskotinum til § 11 a í sambandi við framskundaða pensjón og fyritíðarpensjón, skulu eisini lúka treytirnar til, hvussu býtið verður roknað av samansparda virðinum útgjaldsdagin býtt á lívrentu, lutaeftirløn og kapitalútgjald. Harafturat skulu útgjøld sbrt. § 11 a fara fram gjøgnum afturhaldsskipanina hjá TAKS skatta- og avgjaldsfrítt eins og gjørt verður við onnur útgjøld sbrt. eftirlønarlógini.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu. Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi 1. mars 2026.

Fíggjarmálaráðið, 9.12.2025.

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur